# Álit

# í

## løgtingsmáli nr. 129/2011: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (sjúkrakassafæið)

Landsstýrið hevur lagt málið fram hin 8. februar 2012, og eftir 1. viðgerð 14. februar er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 23. februar og 8. mars 2012.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í heilsumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bárður Nielsen, Jákup Mikkelsen, Rodmundur Nielsen og Bill Justinussen) er ikki samdur við landsstýrismanninum í, at ivamál er, um fæið er alment ella privat. Tað er rætt, at sjúkrakassarnir eru stovnaðir á privatrættarligum grundarlagi, men tá sjúkrakassarnir í 90 árunum bóðu landsstýrið um at broyta lógina, so øll skuldu verða limir, gjørdust sjúkrakassarnir almennir.

Meirilutin fer tó at virða semjuna, sum landsstýrismaðurin hevur gjørt við sjúkrakassarnar, men heldur tó ikki, at rætt er at stovna nýggjan grunn. Ístaðin heldur meirilutin, at grunnurin skal takast av yvir nøkur ár, og setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1 verður í stk. 7 sum 3. punkt sett: "Grunnurin skal innan 10 ár hava útgoldið alt grunsfæið sum stuðul".

**Viðmerkingar:**
Við hesi áseting verður alt fæið í grunninum burtur um 10 ár. Grundarlag er tá ikki longur fyri grunninum, og landsstýrið eigur tí tá at leggja uppskot fyri Løgtingið um at taka av grunnin.

Soleiðis broytt tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Aksel V. Johannesen, Eyðgunn Samuelsen og Kristina Háfoss) hevur hesar viðmerkingar.

Ásannast má, at hetta málið er úrslit av longum samráðingum - yvir umleið 1½ ár - millum sjúkrakassarnar og landið. Alternativið kundi eitt nú verið eitt sakarmál, har greiða fekst á, hvør hevur ognarrættin til sjúkrakassafæið, men ynskt hevur ikki verið at fara hesa leið, men heldur royna semju – og hevur landsstýrið tí eisini gjørt eina semju.

Tað hevði tó verið ynskiligt, at nøkur viðurskifti vórðu nærri lýst í lógaruppskotinum og nærri greinað, áðrenn semja varð gjørd.

Almenn ella privat ogn?
Orsøkin til, at samráðingar vórðu tiknar upp, var, at ósemja var millum landið og sjúkrakassarnar um, hvørt fæið var almenn ogn ella ogn hjá sjúkrakassunum. Men hóast sjúkrakassarnir vórðu stovnaðir á privatrættarligum grundarlagi, so broyttist støðan, tá sjúkrakassarnir í 90-árunum bóðu landsstýrið um at broyta lógina, so øll skuldu verða limir. Tá gjørdust sjúkrakassarnir almennir. Tí verður ikki mett, at ivi er hesum viðvíkjandi. Fæið hjá sjúkrakassunum er almenn ogn.

Egin umsiting ella felags umsiting?
Vit hava í dag nógvar eindir, ið viðvíkja gransking í Føroyum, – Granskingarráðið, Fróðskaparsetur Føroya, Havstovan og Fiskaaling eru nøkur dømi. Nú avkastið av fænum hjá sjúkrakassunum verður tøkt, verður mett, at rættast hevði verið at latið ein av teimum stovnum, sum frammanundan umsita granskingarjáttanir – t.d. Granskingarráðið – virka sum góðkennandi myndugleiki, tá tað kemur til umsóknir um stuðul til granskingarætlanir. Hetta fyri at tryggja fakkunnleika í viðgerðini, og sum heild fyri at sleppa undan, at óneyðuga nógvur peningur verður nýttur til umsiting av granskingarjáttanum.

Peningur til menning og gransking
Talan verður samanlagt um einar 30 mió. kr. Um valt verður at seta hesa upphædd av til ávísa menning og gransking innan heilsuøkið, kemur peningurin uttan iva til til størri nyttu, enn um hann verður spjaddur til nógvar ymiskar verkætlanir, og um bert avkastið av peninginum verður nýtt komandi mongu árini.

Føroyar standa á einum vegamóti, tá ræður um at taka neyðug stig at gerast fremst innan ílegugransking og ílegugranskingarkarmar. Vónin er tí, at grunnurin velur at nýta fæið til eitt nú at seta veruliga ferð á ílegusavnið og ílegugranskingina í Føroyum, tí hetta kann verða við til at skapa framburð, nýggj arbeiðspláss, nýggja vitan og menning sum heild innan heilsuøkið.

Minnilutin heldur, at Sjúkrakassagrunnurin er ein virðiligur varði yvir tað góða arbeiðið, sum sjúkrakassarnir hava gjørt í seinastu meira enn hundrað árini, og vónar og væntar, at virðini hjá hesum fara at seta ferð á gransking innan føroyska heilsuverkið – eitt nú innan ílegur.

Minnilutin ynskir at virða semjuna millum Heilsumálaráðið øðrummegin og sjúkrakassarnar hinumegin, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið, við hesum viðmerkingum.

**Fíggjarnevndin, 12. apríl 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður Nielsen<br>formaður | Kristina Háfoss<br>næstformaður | Bill Justinussen |
| Jákup Mikkelsen | Rodmundur Nielsen | Eyðgunn Samuelsen |

Aksel V. Johannesen